ADHD felagið, Íslandsvegur 10.   24.oktober 2023

Hoyringsvar frá ADHDfelagnum um uppskotið hjá samgonguni at minka um tilskotið og hækka egingjaldið til heilivág, ein broyting, ið ger tað serstakliga nógv verri, fyri fólk við ADHD og familjur, ið eru raktar av ADHD.

ADHD felagið mótmælir stórliga at trivnaðarnevndin góðtekur lógaruppskotið

*LM-025/2023 - Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almenna heilsutrygd (Heilsutrygdarlógin)* ***(Heilivágur gerst dýrari fyri fólk, ið bera brek)*** *Sum ber við sær, at heilvágur gerst dýrari.*

Áleið 70-80% av fólkum við ADHD fáa munandi gagn av ADHD heilivági. Heilivágurin ger, at ung megna skúlan, vaksin sítt arbeiði og foreldur við ADHD, megna gerandisdagin við børnum og halda hús og heim.

Hagtøl í Danmark vísa, at av 25 ára gomlum hava bert 33% við ADHD eina miðnámsútbúgving, hetta í mun til 80% av øllum. Færri enn 10% hava eina longri útbúgving ímun til 1/3 av restina av fólkunum. -Yvir 30% av vaksnum menniskjum við ADHD eru í láglønarbólkum, til samanberingar við 7% av øllum.

Vit vilja heldur hava, at ung og serliga lesandi fáa heilivágin ókeypis, tí brekið ger, at tey skula brúka alla sína orku uppá skúlan, ístaðin fyri at arbeiða fyri heilivág, fyri at megna at ganga í skúla. Vit eru bangin fyri, at kostar heilivágurin for nógv, er einasti mátin at ung lesandi kunna fíggja heilivágin er at selja ein part av heilivágnum til gramma marknaðin.

Tó vita vit, at foreldur í flestu førum royna at rinda heilivágin fyri tey ungu, helst ímeðan tey ganga í skúla. Vit eru stórliga bangin fyri, at hægri gjald fer at økja um fátækaragjónna, tí sperd foreldur fara at hava verri ráð at fíggja heilivágin hjá børnunum, og uttan heilivág fáa tey ikki útbúgving.

Sostatt er hettar við til at fastlæsa ein bólk við breki sosialt, sum hagtøl annar vísa, klárar seg líka væl sum onnur, tá tey fáa viðgerð.

Vit vita, at ADHD er 80% arvaligt, tað vil siga, at nógvar familjur eru, har annað foreldrið og eitt ella fleiri børn hava ADHD. Hjá hesum familjum, fer hækkingin at máa teppið heilt undan.

ADHDfelagið mælir til, at heilivágur átti at verið latin lesandi ókeypis, nevnliga fyri at hjálpa ungum ígjøgnum miðnám og hægri lestna, fyri at tryggja at fólk við ADHD kunnu gerast sjálvbjargnir borgarar.

Nevndin í ADHD Felagnum

Bjørg Dam
Poula Patursson
Maiken á Mýrini
Pætur Nattestad Petersen
Petra Weihe Mikkelsen
Laura Kathrine Apol
Edmund Djurhuus
Eyð-Britt Tjaldrastein
Louisa Fjallsbak
Berit Unn Petersen.